TING-HELLAN

# ...r av heksadoktarum



*– Tað var sum at sita í kirkjuni at hoyra politikararnar, hvør í sínum lagi, royna at útleggja tekstin hjá hesum ymisku advokatunum. Tí eins og prestarnir mugu royna at byggja alt tað, teir siga, á Skriftina, so tordu fáir politikarar at siga nakað uttan so, at teir kundu vísa til okkurt "skriftstað" hjá einum advokati, sigur Sjúrður Skaale um viðgerðina av yvirtøkulógini í løgtinginum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

notat í Jørgen-málinum, hevði løgmaður bílagt hetta notatið. Og tað var - kanska ikki so óvæntað - jaligt mótvegis ætlanum løgmans. Við hesum í hondini kundi Eidesgaard nú siga, at alt var gott.

Tað var sum at sita í kirkjuni at hoyra politikararnar, hvør í sínum lagi, royna at útleggja tekstin hjá hesum ymisku advokatunum. Tí eins og prestarnir mugu royna at byggja alt tað, teir siga, á Skriftina, so tordu fáir politikarar at siga nakað uttan so, at teir kundu vísa til okkurt "skriftstað" hjá einum advokati.

Ein avgerandi munur er kortini: Bíblian er liðugt skrivað. Har er einki at leggja afturat, og einki at taka frá. Men tørvar tær hjálp í politikki, kanst tú altíð bíleggja eitt nýtt notat frá einum nýggjum advokati. Tað varð gjørt fleiri ferðir í hesum málinum. Og allir partar fingu akkurát tað, sum teir vildu hava!

### Fólkið má skilja lógirnar

Hetta málið átti at lært okkum, at advokatar eru menniskju sum tú og eg. Teirra meiningar og metingar fara í hvør sína ætt. Teir kunnu duga væl - men teir kunnu eisini duga út av lagi illa. Og so eru nógvir teirra eisini til sølu til tann, sum bjóðar mest.

Tí er tað skeivt, at advokatar hava status sum politisk orakul. Ein politikari hevur skyldu til at seta seg væl inn í tingini, og síðani taka støðu eftir bestu sannføring. Sjálvsagt kunnu advokatar geva ráð - men politikarin skal ikki keypa sær argument frá advokatum. Hann skal sjálvur duga at grundgeva fyri síni avgerð. Hann skal skilja hvat tað er, hann ger. Og tað vóru tað bert fáir politikarar, sum gjørdu í hesum føri.

Og tað er ikki fyri teirra egnu skyld, at politikararnir skulu gera greiðar lógir og viðtøkur. Lógirnar verða jú gjørdar fyri vanlig fólk. Tí hava politikararnir skyldu til at syrgja fyri, at tað, teir samtykkja, er greitt. Ein og hvør við vanligum begávilsi, sum lesur lógirnar, skal kunna skilja, hvat tær merkja.

Tá bæði politikarar og advokatar og vanlig fólk eru ósamd um hvat tað er, ið løgtingi hevur samtykt, so er talan um út av lagi vánaligt politiskt arbeiði. Og tí var tað undir allan kritikk, at málið um hesar góðu heimildir fór gjøgnum tingið við so minimalari viðgerð, sum tað fekk.

Eitt rópa tey "majorisering". Tað er, tá ein meiriluti trýstir nakað ígjøgnum, uttan at minnilutin fær møguleika at viðgera tað til lítar. Tað var tað, sum hendi í hesum føri. Og úrslitið er tann stóri ivi, sum nú valdar. Eingin skilir hvat hendir á løgtingi, tí har eru gjørdar tvær samtyktir, sum peika í hvør sína ætt.

Hesin forvirringur var sjálvsagt orsøkin til, at Jóannes Eidesgaard hevur víst til tveir advokatar sum siga, at alt í lagi. Tað er sum um hann heldur, at orðið hjá einum advokati er ein blástempling í sjálvum sær. Men tað er nakað vrøvl. Og fyri alt tað hava aðrir advokatar sagt júst tað mótsatta.

Tað er Palleba sum rindar fyri okkara lógarsmíð. Tað, hann hevur fingið fyri pengarnar í hesum føri, er til lítlan sóma fyri landsstýrið og meirilutan á løgtingi.

# Vánaligt ráðgevarahegni?

TINGHELLUKLUMMAN
*Thomas Arabo*



### Idiotaborðini.

Tá íð eg gekk í 1. flokki í barnaskúlanum, vóru vit 32 børn í klassaverilsinum. Tey flestu borðini, sum vit sótu við, vóru í røðum, sum vit síggja tað í dagsins fólkaskúlum. Yviri í einum horni stóðu so nøkur borð fyri seg sjálvan. Hesi borðini vóru rópt idiotaborðini. Tey sum fingu tann ivasama heiður at fáa sess við hesi borð,vóru ikki serliga móttakilig fyri frálæru ella ráðgeving frá tí autoriteti, íð hevði givið teimum sessin.

### Pædagogiska støðan broytt

Síðan er tíbetur nógv broytt, so í dag verða fólk útbúgvin í at læra frá sær. Mentamálaráðið hjá okkum krevur í dag at øll, íð undirvísa á hægri skúlum, afturat einari serútbúgving skulu hava eina slíka eykaútbúgving (pædagogikum). Hettar betrar førleikan at skilja onnur menniskjur, flyta vitan og ráðgeva øðrum.

### Óheppin málburður

Kom at hugsa um hesi tingini nú eg sá okkara vælútbúna og gløgga formann í búskaparráðnum úttala seg til Dag og Viku. Hann hevur neyvan tikið pædagogikum ella nakað, ið líkist tí.

Hann er formaður fyri Búskaparráðnum, ið skal ráðgeva politikarum. Hesir kunnu so brúka ráðini ella lata vera - tað er teirra val. Fyrsta fyritreytin er tó, at teir lurta eftir ráðgevingini. Við at nýta "idiotaborðspædagogikkin" blokerar man fyri øllum frekvensum, og ráðgevingin verður ikki hoyrd.

### Politiska uppgávan

Okkara politikarar hava ikki nakra einfalda uppgávu. Teirra høvuðsmálsetningur er at skapa góð livilíkindir fyri tað tal av fólki, íð vil búgva her á oyggjunum í størri og smærri bygdum og býum, við so víðum vinnurættindum og møguleikum sum gjørligt. Hesin málsetningur verður ikki rokkin bara við økonomiskum lógum. Tingini eru nógv meira kompleks enn so. So okkara økonomar mugu finna seg í at virða tann politiska suverenitetin, har ikki altíð verður lurtað eftir teimun, men onnur viðurskifti verða avgerandi.

### Ráðgevarastøðan

Hesa sannroynd má Búskaparráðið eisini liva við. Politikarin er suverenur og kann velja og vraka millum tey ráð, hann fær. Hann er eisini menniskja og dámar neyvan at taka ímóti ráðum frá fólki, sum alment ákærir hann fyri at fáast við kraddaravirksemi.

Mangur hevur sannað vísdómsorðini " Den tænkte tanke kan altid siges, det sagde ord kan aldrig ties ".